NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føðingar

29. september fingu Janette Kjær Rasmussen og Tórhallur Reinert, Vojens, Danmark, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3730 gr.

4. oktober fingu Katrina og Alvin Joensen, Vági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

8. oktober fingu Jóna Leo og Kári í Lágabø, Vági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3850 gr.

10. oktober fingu Begga og Búgvi Vang, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4430 gr.

10. oktober fingu Marita og Jógvan Vilhelm, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2500 gr.

11. oktober fingu Noomi og Petur Reinert, Nørre Nissum í Lemvig, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3650 gr.

11. oktober fingu Malan Ellingsgaard og Astvard Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3280 gr.

13. oktober fingu Linda og Dánjal Debes, Oyri, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4700 gr.

13. oktober fingu Joan Carlsson og Magnus Madsen, Stykkið, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3300 gr.

13. oktober fingu Gunnvá Vang og Jógvan í Toftum Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4100 gr.

15. oktober fingu May-Brith Joensen og Sunnleif Skibenæs, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3410 gr.

15. oktober fingu Jóna Thomassen og Zacharias Nielsen, Sandavági, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 5700 gr.

16. oktober fingu Elly E. Joensen og Andreas Petur Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4000 gr.

Andlát

9. oktober
Sverri Jespersen, úr Havn búsitandi í Svendborg, 59 ár

10. oktober
Berta Olsen, Svínoy, 80 ár

11. oktober
Sólveig Rasmussen, fødd Thomsen, Havn, 76 ár

12. oktober
Hjartvard Hvíthamar, Sandavágur, 60 ár
Anna Kristina Jacobsen, vanliga nevnd Stina, Klaksvík, 86 ár

14. oktober
Alexandra Skaale, Skopun, 86 ár
Sigurd Martin Djurhuus, Porkeri, 88 ár

15. oktober
Olivar Rasmussen, Saltangará, 90 ár
Kjartan Hentze, Sandur, sonur Mariannu og Jóan Petur Hentze, andaðist á Amtsjúkrahúsinum í Glostrup, 17 ár
Aksel Petersen, ættaður av Norðskála búsitandi á Toftum, 43 ár

Minningarorð

Soleiðis fara tey undan okkum
eisini í bestu manndómsárum,
nú fór

Niels Holm Johannesen

vanliga nevndur Homm
búsitandi í Hvalvík ættaður av Argjum
f. 30-11-1960 - d. 01-10-2003

Skelkandi og óskiljandi bórust boðini okkum. Hommurin er farin. Okkara Homm var ikki millum okkum meira. Hesin so sterki og reysti maður hevði endað seinasta stríðið og lagt árarnar inn, bert 42 ár til aldurs.

Homm var valdur í nevnd Havnar Arbeiðsmannafelags á aðalfundinum 2003, og hevði hann sostatt bert verið nevndarlimur í minni enn eitt ár, nú boðini brádliga vóru eftir honum. Tað sást í einum at Homm í arbeiði sínum sum nevndarlimur legði sera stóran týdning í at vera nærlagdur til tess at vinna limum felagsins bestu sømdir, og hann var ikki ræddur fyri at taka á sín rygg tað ábyrgd, hann altið kendi í tí at stríðast fyri betran av korum arbeiðaranna.

Tað eyðkendi Homm í felagsarbeiði, at hann var heilur í tí, hann fekst við. Hann hevði sína greiðu hugsan og var ivaleysur í síni sannføring um tað, sum kundi bera framá fyri arbeiðaran.

Tá tað breyt um bæði borð í vár, tók Homm dyggiliga lut í tí arbeiði, sum gerast skuldi, og hansara partur lá sanniliga ikki eftir. Jú tú kendi teg væl at hava hann innanborða saman við tær.

Homm var stillførur, fryntligur og sera vinsælur maður. Var okkurt, tú vildi hava hann at hjálpa tær við, ja so var leyst og liðugt við einum brosi.

At tíðin okkum var givin saman við Homm skuldi gerast so stokkut vardi ongan okkara, og enn einaferð mega vit ásannað, at Harrans vegir eru ikki okkara, og ongin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldið gistir.

Vit hava við Homm mist ein góðan vin og stríðsfelaga, sum verður saknaður almikið av okkum í felagnum. Við virðing og tøkk fyri tað hann legði eftir seg og í djúpastu samkenslu við tykkum sum vóru honum nær, drýpa vit høvur og lýsa frið yvir minnið um Niels Holm Johannesen.

Havnar Arbeiðsmannafelag

Minningarorð um Jóhan Olsen

f. 04.10.22 – d. 18.08.03

Tung vóru boðini tann 18. august, um at okkara kæri pápi var farin, eftir drúgva sjúkralegu. Sjálvt um vit vistu, at hann ynskti at koma heim til sín faðir, sum hann so trúliga hevði fylgt alt sítt lív, er saknurin eftir okkara pápa sera stórur, ikki minst fyri teg góða mamma. Vit sum vóru um hann hesa seinastu tíðina, vistu at hann hevði brúkt sínar seinastu kreftir, og ikki orkaði at stríðast meira.

Pápi var eitt sera kensluborið menniskja, sum hevði lætt við at vísa bæði gleði og sorg. Serliga minnast vit, at hann altið vildi fáa so nógv burtur úr tíðini, sum yvirhøvur gjørligt. Tí var tað undarligt fyri okkum, nú hann lá sjúkur og nóg illa orkaði at koma upp úr songini. Tó var hann altið áhugaður í at hoyra um, hvussu øll hansara nærmastu høvdu tað.

Tað sum sermerkti pápa okkara var, at hann hevði tað best, um hann kundi gera okkurt gott fyri onnur og serliga um tað var fyri Guds ríkis sak. Hetta bera eisini allar hansara dagbøkur boð um, sum hann hevur skrivað ígjøgnum tey mongu árini hann hevur arbeitt sum sjómanstrúboðari. Eisini allur tann stóri skarin av fólki sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað og allar tær mongu heilsanir frá bæði nær og fjar, bóru týðiliga boð um, at pápi hevði ein stóran vinaskara víða umkring.

Upp ígjøgnum barnaárini ferðaðist øll familjan nærum á hvørjum ári til Íslands og okkurt árið til Grimsby, har mamma og pápi virkaðu fyri sjómansmissiónina. Hesi árini hava vit nógv góð minnir frá og hevur tað eisini verið við til at sett dám á okkara lív. Eitt serligt minni um tíðina í Íslandi, var hansara áskoðan um at eingin, ið kom á gátt bleiv koyrdur út aftur, tað var líka mikið, hvussu ein var fyri. Tað hendi ikki so sjáldan, at menn duttu inn, som komu úr »Ríkinum«, sum lá beint yvir av sjómansstovuni á Skúlagøtu. Onkur kundi vera sera illa fyri, men altið var ein góður drekkamunnur hjá teimum at fáa, og pápi gav sær eisini altið stundir til eitt prát um teirra støðu og av og á eina song at sova í.

Nógvar góður løtur vóru saman við teimum mongu sjómonnunum, sum komu innar at lesa bløðini og stytta sær stundir meðan teir lógu í havn. Mong vinabond blivu eisini knýtt við teir føroyingar, sum búðu í Íslandi. Hesir føroyingar, saman við íslendskum vinum, møttu so trúliga upp til møtini, sum hildin vóru hvønn sunnudag á sjómansstovuni. Stuðlaður av hesum fólkinum, legði pápi til brots at savna inn pening til nýtt sjómansheim, sum var ein gamal dreymur hjá pápa. Takkað verið hjálp frá góðum fólki, bæði í Íslandi og Føroyum stendur nú hesin snotiligi bygningurin sum eitt bindilið millum Føroyar og Ísland.

Eitt, sum eisini sermerkti pápa var, at hann var góður at seta ymiskt í verk. Í heimbygdini Rituvík hevði hann stóran áhuga fyri teimum ungu. Í tí gamla skúlanum í bygdini, sum var eitt samlingsstað hjá teimum ungu, setti hann ymisk tiltøk í verk. Børnini í bygdini gloymdi hann heldur ikki, tey sluppu altíð at vera við í tí hann tókst við. Tá ið farið var burtur í torv, hevði hann ein heldur sermerktan vogn at koyra torvið heim við og hendan vognin stuttleikaðu børnini sær óført við. Nú fyri kortum, tá tað bleiv gjørt eitt spælipláss í bygdini, var hann eisini ofta at síggja millum teirra, ið arbeiddu í fritíðini.

Vit hava mist ein góðan pápa, og saknurin er stórur, tí vit kundu altið koma til hann við øllum okkara lívsviðurskiftum, bæði á tí tímiliga og á tí andaliga økinum. Og væl dámdi honum, tá ið hann kundi samla øll síni kæru rundan um seg til Guds orð og at syngja nakrar sangir saman.

Við hesum orðum vilja vit lýsa frið yvir minnið um okkara elskaða pápa.

Børnini

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sámal Kragesteen 85

Leygardagin 18. oktober fyllir ein kendur havnarmaður 85 ár. Tað er Sámal Kragesteen, sonur Hjalmar Kragesteen og Ane Sofie, fødd Debess, dóttir Laurits í Mortanstovu. Sámal er giftur við Súsannu (Sannu), fødd Debes, dóttir Sámal Debes á Oyri. Tey hava trý børn: Fróðu, Hera og Sofiu.

Sámal vaks upp á Krákusteini, kletturin har krákuog ravnsnev einaferð vórðu brend, og sum hevur givið navn til børnini hjá Samuel F. Samuelsen, abba Sámal. Kletturin er ikki til longur, er sprongdur burtur, og liggur onkustaðni undir kajuni niðanfyri húsini har tey búgva við Vaktarhúsgøtu. Liviumstøðurnar í millumkrígsárunum hava ikki verið lættar hjá barnaríkum familjum í Havnini. So Sámal lærdi, sum so mangur annar, tíðliga at vera vera við til at fáa mat og pening til vega til heimið. Og hevur tað merkt, at hann hevur lært at fáast við tað, ið hevur við sjógvin at gera, at taka á seg alt fyrifallandi arbeiði og at brúka og menna tað hegni, hann hevði.

So Sámal er kendur sum sera dugnaligur útróðrarmaður. Harumframt sum ein, ið ongantíð hevur flirt fyri at taka arbeiði á seg.

Sanna og Sámal Kragesteen

Men kanska serliga er hann kendur sum stak hegnigur húsasmiður og timburmaður annars, tí hendurnar hevur hann góðar. Hann hevur staðið í læru hjá Stephansson sum timburmaður, og hevur arbeitt sum so í nógv ár bæði hjá Danberg & Joensen og ikki minst hjá Lamhauge & Waagstein, tvey av mongu byggjufeløgunum í Havn, ið ikki eru til longur. Sámal var eitt stutt skifti eftir kríggið í Íslandi og arbeiddi, og sigldi eftir tað, til seinast í fimti árunum, sum fýrbøtari við trolaranum Kalsevni. Uppilagstur arbeiddi hann sum timburmaður í nógv ár til hann gavst við tí, og fór á lagrið hjá Leif Mohr at arbeiða, har hann var, til hann fór frá vegna aldur. Men alt hevur ikki bara verið arbeiði. Sum rættur havnarmaður, saman við øðrum góðum fólkum, var hann við til at seta B-36 á stovn, og man í dag teljast millum teir fáu, ið eru eftir av tí ættarliðinum.

Sámal er burturstaddur á føðingardegnum. Hann heldur dagin saman við børnum, og abba- og langabbabørnum.

Prógv sum stýrimenn fyri 25 árum síðan

Í juni 1978 fingu 12 stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla. Teir vóru: Hallur H. Mohr, Fuglafjørður, Dánial P. Hansen, Sandavágur, Jákup Næs Joensen, Hvalba, Anton Pauli F. Johansen, Miðvágur, Bjarni Petersen, Kollafjørður, Finnbjørn Johansen, Sandavágur, Hans J. Joensen, Vágur, Óla J. Kruse, Eiði, Hans M.Ø. Andreasen, Kvívík, Niclas J. Hovsgarð, Hov, Eyðun Samuelsen, Haldórsvík og Símun Pauli Sivertsen, Klaksvík.

Kelda: Myndaarbókin "Áriðið fór" 1978

Hans Jacob Kollsker:

Vann ferðina til San Marino

Victor Carlsen sølumaður hjá Føroya Shell handar her Hans Jacob Kollsker heiðursbrævið uppá ferðina til San Marino

Mynd: Maria Olsen

Hans Jacob Kollsker í Hoyvík, sum eigur og rekur Bilverkstaðið v.Hans J. Kollsker á Hjalla, fekk hósdagin heiðursbræv frá Føroya Shell í sambandi við at hann hevði vunnið høvuðsvinningin í kappingini Shell Helix Grand Prix 2003

Í samband við Formel 1 kappkoyringina 2003, sum byrjaði 9. mars í Melburne í Australia og endaði 12. oktober í Suzuka í Japan, hevur Føroya Shell skipað fyri kappingini "Shell Helix Grand Prix 2003", ið er ein spurnarkapping millum starvsfólk á føroyskum bilasølum og bilverkstøðum. Kappingin snúði seg um at fylgja Formel 1 kappkoyringini og innan 24 tímar eftir hvørt Grand Prix at svara trimum spurningunum pr. telefon. Tey, sum vóru við í lutakastinum um høvuðsvinningin vóru bert tey, sum høvdu fult stigatal. Umframt fleiri aðrar vinningar var høvuðsvinningurin ein ferð til San Marino í Italiu, sum er heimabanin hjá Ferrari. Høvið verður eisini at vitja á Ferrari verksmiðjunií Maranello.

Hans Jacob Kollsker er fegin um vinningin og ætlar sær at fara til San Marino í vár.

Dagurin

18. oktober. Lukas. Evangelistur og ápostlasøguskrivari. Halgisøgan sigur, at hann eisini var listamálari og málaði eina mynd av Mariu Moy. Eisini verður sagt, at hann doyði friðarliga 84 ára gamal.
Navnið er grikst og merkir *maður úr Suðuritaliu.*

19. oktober. Baltasar. Ein av teimum trimum vísmonnunum. Eftir halgisøguni bar hann skegg og var blámaður. Bábelskt navn, ið merkir *Baal skal verja hann.*

20. oktober. Felicianus, deyður í umleið 250. Foreldur hansara vóru kristin fólk í Forum Flamini í Italiu. Ungur kom hann til Róm og gjørdist erkadiakonur hjá pávanum. Pávin Viktor setti hann sum biskup í heimbygdini. Keisarin Decius læt hann taka av døgum.
Hans Andreas Djurhuus varð føddur hendan dagin í 1883 og Mikkjal á Ryggi doyði hendan dagin í 1956.